## Føðingar

3. apríl fingu Sunrid Olsen og Gunnleif Rasmussen, Skála, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 2590 gr.

4. apríl fingu Annebeth G. og Arni Abrahamsen, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3300 gr. Hon eitur Marianna.

5. apríl fingu Jütta og Jógvan B. Reynslá, Argir, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4400 gr. Hon veitur Eyðbjørg.

5. apríl fingu Lív Joensen og Richard Herup Johansen, Sandavági, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3050 gr.

6. apríl fingu Eyðrit N. Olsen, Hvalba, og Frits Strøm, Trongisvági, búsitandi í Esbjerg, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3200 gr.

7. apríl fingu Súsanna Marjunardóttir og Bogi Jacobsen, Hoyvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3600 gr.

10. apríl fingu Linda René Sørensen og Jóhan Petur Olsen, Argjum, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3220 gr.

## Andlát

**3. apríl**
Jenny Jacobsen, Miðvágur, 89 ár.
**4. apríl**
Maria Nystrøm Egholm, ættað úr Klaksvík, 58 ár.
**5. apríl**
Sigga Debes, búsitandi í Keypmannahavn, ættað av Oyrareingum, 98 ár.
Óli Frits Johannesen í Húsavík, 64 ár.
**6. apríl**
Petur Sofus Eliasen, Klaksvík, 83 ár.
Andrea Ludvig, Fámjin, 87 ár.
**7. apríl**
Elin Haraldsen, Sandavági, 94 ár.
Turid Kruse, Eiði, 78 ár.
**9. apríl**
Kristina Weihe, Søldarfjørð, 93 ár
Mia Trónd Jensen, Havn, 88 ár

## KONFIRMATIÓNIR

**Konfirmantar í Christianskirkjuni pálmasunnudag**
Jákup Gunnarstein Hansen, Mylnugøta 34, Klaksvík
Helgi Christiansen, Kjalarvegur 12, Klaksvík
Torstein Eltør, Stoksoyravegur 25, Klaksvík
Ísak Hansen, Túvuvegur 8, Klaksvík
Petur Rosenlund Olsen, Rættargøta 4, Klaksvík
Olivur Bech Andreasen, Stoksoyrabakki 9, Klaksvík
Hallstein Eivindarson Jacobsen, Garðavegur 24, Klaksvík
Álvur Fuglø Christiansen, Norðdepil
Dávid Thomsen, Hvannasund
Ari Samson, Kráargøta 76, Klaksvík
Hellen Jacobsen, Garðsendi 4, Klaksvík
Monica Larsen, Garðsendi 21, Klaksvík
Rósa Lassen, Undir Brúnni 24, Klaksvík
Ann Kristina Samuelsen, Jørundsgøta 40, Klaksvík
Birna Arge, Garðsendi 24, Klaksvík
Sigrid Mikkjalsdóttir Joensen, Garðsendi 23, Klaksvík
Sunnvør Klettskarð í Kongsstovu, Haraldsund
Mary Leivsgarð, Hamarssniðið 18, Klaksvík
Ann Marie Erlingsdóttir Petersen, Torvgøta 29, Klaksvík
Karin Dorthea Simonsen, Bumshamarsvegur 31, Klaksvík
Elisabeth Thomsen, Hvannasund

**Konfirmantar í Húsa kirkju páskadag**
Hallur Syderbø, Húsar
Kristina Petersen, Syðradalur

## Sølvi Winther Olsen diplomlækni



Sølvi Winther Olsen, kommunulækni í Havn, gjørdist herfyri diplomlækni í ítróttarmedisini. Sølvi hevur seinastu tólv árini verið fastur lækni hjá føroyska ítróttarhópinum, ið luttekur í Oyggjaleikunum, umframt at hann er næstformaður og medisinskur ráðgevi hjá føroyska dopingeftirlitinum. Sølvi er frammanundan serlækni í almennum medisini. Við tað at ítróttarmedisin ikki er viðurkent sum eitt serlæknaøki, ber tað til at utbúgva seg sum diplomlækna við at uppfylla ávís krøv. Sølvi hevur verið til nógv ymisk skeið og á fleiri ráðstevnum, umframt at hann hevur hollar royndir á økinum. Tað er ein undirnevnd hjá DIMS (Dansk Idræts Medisinsk Selskab), sum stendur fyri hesi útbúgving. Umleið 30 læknar í danska kongaríkinum hava hesa útbúgving.

# »Guðs faðirhjarta« á nýggjari fløgu

### - Vakri lovsangurin á fløguni er sprottin úr "guds faðirhjarta", sigur útgevarin

FLØGUÚTGÁVA
*Vilmund Jacobsen*

Nú páskastevna verður í ítróttarhøllini á Skála, gevur Keldan út nýggja lovsongsfløgu. Á fløguni eru lovsangir, sum eru skrivaðir av fólki í sonevnda lovsangsbólkinum.

- Lovsongur hevur altíð eyðkent samkomuna í Kelduni. Í longri tíð hevur tað verið eitt stórt ynski at fáa lovsangin runt landið. Tað er tí ein stór gleði fyri okkum nú at kunna bjóða eina fløgu framm, sum er á høgum støði, bæði sang-og tónlistaliga.

Tey, ið standa aftanfyri útgávuna, siga, at vakri lovsangurin á fløguni er sprottin úr "guds faðirhjarta", sum eisini er heitið á fløguni.

Lagt verður aftrat, at á fløguni hoyrist lovsangur, sum "lyftir upp Jesu navnið".

Í Kelduni vóna tey, at fløgan verður til gleði fyri tann einstaka og ein íblástur til aðrar samkomur.

22 fólk eru í kórinum, og millum eru eisini solistarnir, Lisa Frederiksberg, Terji Vestergaard, Maria á Boðanesi, Kristina N. Hansen og Eyðun Jacobsen.

Kristoffur Mørkøre hevur lagt tónleikin til rættis og spælir á flestu ljóðførini, hjálptur av øðrum.

Fløgan er upptikin í Kris_Stuf Studio og Studio 2 í Útvarpi Føroya.

Keldan sigur, at fløgan verður fyrstu ferð víst fram skíriskvøld á páskastevnuni og fæst til keyps eftir møtið.

"Guðs faðirhjarta" verður at fáa kring landið eftir páskir.




*Húsin á fløguni við lovsangi, sum Keldan gevur út*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Bent Bruun Hansen 40 ár í Føroyum



*Bent Bruun Hansen saman við hundinum Samson*

13. apríl eru liðin 40 ár síðan danin Bent Bruun Hansen kom til Føroya at arbeiða á radarstøðini á Sornfelli í 1963. Bent, ið er 65 ára gamal, er føddur í 1938 í danska býnum Skælskør. Tá hann í 1972 skuldi flytast úr Føroum til Bornholm, segði hann upp hjá hervaldinum og fór at arbeiða sum goymslumaður hjá Thomas Dam. Í 1975 koyrdi hann við egnum vøruvogni á bilstøðini Bil og seinni á Mini Taxi. Í 1977 rak hann handilin Autoparts, ið seldi eykalutir og útgerð til bilar, á Kirkjuvegi í Havn, til hann í 1978 fekk koyriloyvi á bilstøðini Auto í Havn, har hann koyrdi í tilsamans 15 ár. Hann var eisini partaeigari í Auto og koyrdi á støðini til 1993. Eitt sum hevur sermerkt Bent er, at hann hevur búð í nógvum ymiskum støðum. Hann hevur t.d. búð í Kvívík, í Kollafirði, í Hósvík, í Streymnesi, á Langasandi, í einari niðurlagdari kiosk á Stykkinum, í einum umbygdum lastbili í Syðradali og í ymiskum summarhúsum. Seinastu 10 árini hevur hann búð á Ternuryggi í Havn. Fyrr dámdi honum væl at skjóta harur og at skjóta fugl og at fiska. Bent er ein býarmynd í Havn, hesin fryntligi maðurin sum gongur túrar í býnum við hundi sínum, Samson. Bent er altíð blíður og týður, heilsar og gevur sær stundir til eitt hugnaligt prát. Hann eigur eina dóttir og eina abbadóttir í Norðursælandi. Um orsøkina til at hann hevur verið her í so mong ár, sigur Bent, at honum hevur dámt so sera væl í Føroyum.

## Victoria 70 ár



Mikudagin 9. apríl fylti Victoria Jacobsen í Fuglafirði 70 ár. Hon er dóttir Henrikku og Victor Danielsen. Í 1963 giftist hon Ivani Jacobsen úr Vestmanna. Victoria og Ivan fingu 5 børn.

Victoria er frísk og røsk, og tað er ikki ov nógv sagt, at hon er eitt arbeiðsgrev. Tað ber ikki til at gita, at hon hevur rundað tey sjeyti.

Myndin er tikin føðingardagin!

Av børnunum hjá Victoriu og Ivani, er Sólrun gift Ulrik Martinussen úr Kærteminde og býr har. Randi er búsitandi í Klaksvík, gift Jákupi Biskopstøð. Jóhan doyði 18 ára gamal í ferðsluvanlukku. Victor er trúlovaður Ranvá Thorsteinsson av Tvøroyri; tey eru búsitandi í Keypmannahavn. Hans Christian gongur á sjómansskúla í Marstal á Ærø. Hann er trúlovaður gentu úr Portugál, sum eitur Malaika.

Victoria og Ivan eiga 2 ommu- og abbabørn.

## Remy Hjaltalin á Kamarinum útbúgvin kokkur



13. februar bleiv Remy Hjaltalin á Kamarinum útlærdur sum kokkur við Frederik´s Restaurant á Frederikssundsvej 146 B í Brønshøj. Remy er føddur og uppvaksin í Havn, hann er 29 ára gamal, sonur Dagbjørg Hjaltalin og Ingvald á Kamarinum. Hann hevur siglt og havt ymisk fyrifallandi arbeið. Í 1994 flutti hann við familjuni til Danmarkar at búgva. Í 1999 fór hann í læru sum kokkur. Hann hevur verið í starvsvenjing á Kokkeriet í Keypmannahavn, ið var ein restratión og catering, á Radisson SAS Globetrotter Hotel og á Radisson Royal Hotel í Keypmannahavn. Seinastu tíðina var hann á Frederik´s Restaurant, har hann gjørdi seg lidnan við útbúgvingina. Hann arbeiðir í dag sum køksmeistari á Frederik´s Restaurant. Remy sigur, at øll hesi arbeiðsplássini hava givið honum hollar starvsroyndir, og at hann hevur verið sera heppin at sleppa at royna so nógv ymisk arbeiðspláss. Saman við Gunrid Reinert úr Havn eigur Remy fýra børn, tey eru: Tór 10 ár, Eyð 7 ár, Bárður 2 ár og Fríði sum er fimm mánaðar gamal. Familjan hjá Remy er flutt til Føroya, og ætlar hann at koma heim í nærmastu framtíð.

## GULLBRÚDLEYP

Pálmasunnudag 13. apríl hava Fríðbjørg og Andreas Højgaard í Rituvík gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum saman við børnum við familju.

Mánadagin 14. apríl hava Vilhelmina og Hans Johansen, Argjavegur 61, verið gift í 50 ár. Fólk eru vælkomin at støkka inn á gólvið millum kl. 10 og 15.

## BRÚDLEYP

Í dag, 12. apríl, kl. 15.00 giftast í Gøtu kirkju Sonja Heinesen, Norðragøtu, og Rógvi Jacobsen, Glyvrar. Veitsla verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

Í dag, 12. apríl, kl. 14.30 giftast í Ebenezer Herborg Guttesen og Súni Haraldsen, bæði úr Havn. Veitsla verður kl. 18.30 í B36-húsinum fyri innbodnum.

Í dag, 12. apríl, kl. 10.00 giftast í Ebenezer, Tórshavn, Sólvá Mørkøre, Tórshavn, og Sam Vang, Oyrarbakki. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 13.00.

## PRÓGV

13. februar varð Remy Hjaltalin á Kamarinum avlærdur sum kokkur frá Frederiks Restaurant á Frederikssundsvej 146 D, 2700 Brønshøj.

## Dagurin

12. apríl. Julius, deyður í 352. Til minnis um pávan Julius 1. Rómverskt ættarnavn.

13. apríl. Jústinus, deyður umleið 165. Heiðin maður í Sámáriu; varð upplærdur í grikskari heimspeki og fekk navnið heimspekingurin. Gjørdist kristin og varð tí tikin av døgum í Róm. Navnið merkir hin rættvísi.

14. apríl. Summarmáli. Eftir gamlari føroyskari tíðarrokning byrjar summarhálvárið henda dag. Sagt var, at á summarmála avdagast ikki, tí var klárt í veðrinum, skuldi dagsglæman ikki hvørva. Soleiðis sum summarmáladagur er, soleiðis várið. Lundin kemur á summarmála, og um gamla summarmála (26. apríl) reinsar hann sær holuna. Eisini sigst steinstólpa at koma á summarmála. Dagurin eitur annars Tiburtius. Saman við bróður sínum varð hann tikin av døgum umleið 225. Føroyskt navn er Bursi.